# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Býráðið

**Dagfesting:** 29.03.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal,

Varalimir: Bergtóra Cederiusdóttir

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 6/23 | 23/00183-1 | Innkalling av Bergtóru Cederiusdóttir, sum tiltakslim til býráðsfundin 29. mars 2023 |
| 7/23 | 23/00046-4 | Tilmæli um at grava avvarandi omaná |
| | | |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 6/23
## 23/00183-1 Innkalling av Bergtóru Cederiusdóttir, sum tiltakslim til býráðsfundin 29. mars 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.03.2023 | 6/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Ólavur Larsen hevur boðað kommunustjóranum frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 29. mars 2023, og tí ynskti hann tiltakslimin kallaðan inn til býráðsfundin. Henda innkallan er sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Av tí at fjórðvalda á lista Á Lillian Jacobsen er vorðin tekniskur leiðari verður frá ferð til ferð mett um hennara gegni, at luttaka á býráðsfundi. Á listanum aftaná Lillian Jacobsen stóða á jøvnum millum Bergtóru Cederiusdóttir og Thordur Egholm. Lutakast teirra millum førdi við sær at Bergtóra Cederiusdóttir er 1. tiltakslimur og Thordur Egholm 2. tiltakslimur í røðini aftaná Lillian Jacobsen.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 29. mars gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Bergtóru Cederiusdóttir eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ólavur Larsen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 29. mars 2023 |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Viðvíkjandi raðfylgju sum tiltakslimur á lista Á í Fuglafjarðar kommunu |
| Viðgerð | |

2

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti í Fuglafjarðar býráð í sambandi við fundin 29. mars 2023. | | |
| Dagf | 28. mars 2023 | | |

**Býráðið 29. marts 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá borgarstjóranum um, at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti fyri Ólavur Larsen á býráðsfundinum 29. mars 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**7/23**
**23/00046-4 Tilmæli um at grava avvarandi omaná**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 16.03.2023 | 10/23 |
| 2 Býráðið | 29.03.2023 | 7/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tað er ein sannroynd at plássið í kirkjugarðinum í Fuglafirði er ógvuliga avmarkað. Arbeitt verður við at byggja kirkjugarðin út, men tað tekur í minsta lagi tvey ár áðrenn gravast kann í nýtt lendi.<br><br>At kunna grava avvarandi omaná hvørt annað hevði hjálpt uppá plásstrupulleikan, bæði nú og í framtíðini.<br><br>Hetta verður gjørt í fleiri kommunum í Føroyum, sum til dømis á Nesi og í Klaksvík. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært reglugerðini fyri kirkjugarðsnevndnia, skal hon gera tilmæli til kommununa í øllum viðurskiftum sum hava við kirkjugarðarnar í Fuglafirði og Hellunum, at gera. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Fundarfrágreiðing frá 23.02.2023 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður teknisku nevnd at taka undir við áheitanini frá kirkjugarðsnevndini um at fara undir, at grava lík av avvarandi omaná hvørt annað. | | |
| Dagf | 27. februar 2023 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Tekniska nevnd 16. mars 2023:**
Tekniska nevnd mælir einmælt býráðnum til at fylgja tilmælinum frá kirkjugarðsnevndini.

**Býráðið 29. marts 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd um at grava avvarandi omaná hvørt annað.

5

Fundurin lokin kl. 20.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

8

Elvin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Bergtóra Cederiusdóttir